HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Royndir við havtaskugørnum

Tórshavn · 2007, 2008, 2009



**Kristin Vilhelmsen**

**Kristian Zachariassen**

**HAVSTOVAN NR.: 11-02**
**SMÁRIT**

# Innihald


Samandráttur ........................................................ 3

Endamál ............................................................. 3

Útgerð og framferðarháttur ................................. 3

Úrslit ................................................................. 5
Ymiskir litir á línunum ................................. 5
Merki við ymiskum litum hangandi á gørnunum ............................................................ 5
Royndir við ymiskum meskastøddum ........... 7

Niðurstøða ........................................................ 8
Litur á línum ............................................... 8
Merki við ymiskum litum á gørnunum ........... 8
Ymiskar meskastøddir .................................. 8

# Royndir við havtaskugørnum.

**Royndir gjørdar við M/S Gudrun í 2007, 2008 og 2009**

Ábyrgd: Kristin Vilhelmsen og Kristian Zachariassen

Skrivað frágreiðing: Kristian Zachariassen

**Samandráttur:**
Garnabáturin Gudrun, KG 243, úr Klaksvík hevur í fleiri ár gjørt royndir við havtaskugørnum. Hann hevur millum annað roynt ymiskar meskastøddir á gørnunum, ymiskar litir á netinum, ymiskar litir av línum og at hongt "merki" við ymiskum litum á gørnini.
Á tí dýpi sum gørnini standa , eru litirnir fyri tað mesta burtur, soleiðis at alt er svart og hvítt. Tó kann hugsast, at litir kunnu hava týdning á tann hátt, at summir litir fella meira saman við tað sindri av ljósi, sum er, meðan aðrir síggjast betur.
Í royndunum 2007 til 2009 varð roynt við tveimum ymiskum litum á línum, grønar og hvítar. Eisini varð roynt at heingja "merki" við ymiskum litum upp á netið fyri at vita, um hesi møguliga kundu lokka havtasku til gørnini.
Royndirnar vísa, at litur á línunum kann hava nakað at siga. Í miðal var veiðan við hvítum línum 25% betri enn við grønum línum. Serliga stórur munur var á veiðuni tríggjar setur, og fimm setur fiskaðu gørnini við grønum línum betur. Hetta var í vánaligum fiskiskapi.
Í 2007 og 2008 vísti tað seg, at gørnini fiskaðu betur, um merki hingu á gørnunum. Serliga gott var, um merkini vóru gul. Í 2009 var tað øðrvísi. Tá fiskaðu gørnini við gulum merkjum minst, meðan tey ómerktu fiskaðu tað sama, sum ein annar litur.
Eisini var roynt at hava ymiskar meskastøddir á gørnunum, fyri at vita, um sami munur var á fiskiskapinum sum í 2003, tá royndir við meskastøddum vórðu gjørdar við sama skipi. Hesar royndir vístu, at myndin ikki er tann sama, sum í 2003. Í 2003 vísti tað seg, at av meskastøddunum 280mm, 300mm, 380mm og 400mm fiskaðu gørnini við 380mm best í nøgd. Í hesum royndunum vórðu brúkt gørn við meskastøddunum 300mm, 330mm og 380mm. Gørnini við 300mm meskum vístu seg at fiska best, meðan tey við 360mm fiskaðu ringast.

**Endamál:**
Endamálið við royndunum var at vita, um litur og annað hevur nakran týdning fyri fiskiskapin eftir havtasku, tá fiskað verður á millum 150 og 200 metra dýpi.

**Útgerð og framferðarháttur:**
Garnabáturin "Gudrun", KG 243, úr Klaksvík gjørdi royndirnar í samstarvi við Havstovuna. Gudrun er 19,54 m til longdar og er merktur 62 BRT. Báturin hevur loyvi at royna eftir havtasku norðanfyri Føroyar.
Til royndirnar varð ein trossi við tilsamans 200 gørnum nýttur. Ein trossi er ein strongur við gørnum knýttum saman. Trossin var riggaður til á tann hátt, at 40 gørn av hvørjum slag vórðu í honum. Havtaskurnar í hesum trossa vórðu taldar, soleiðis at talið av havtaskum í teim ymisku gørnunum

varð skrivað niður hvørja draging. Fólk frá Havstovuni varð við Gudrun nakrar túrar. Tá vórðu havtaskurnar í hesum trossa eisini mátaðar.
Tað vórðu 3 sløg av merkjum nýtt. Tríkantaði (40 cm x 27 cm), strimlar (35 cm x 7 cm) og reyðir silkistrimlar (5 cm x 40 cm). Tvey merki vórðu hongd uppá hvørt garnið. Tey vórðu fest í meskarnar mitt á garninum umleið 5 metur frá hvørjum enda.

3 ymiskar meskastøddir vórðu royndar í 2009. Meskastøddirnar vóru (fullur meski) 300 mm, 330 mm og 360 mm. Vanliga meskastøddin hjá M/S Gudrun er 300 mm, Tó hava teir av og á nýtt nakað av gørnum, har meskastøddin er 330 mm.

Tveir litir av línum vórðu roynd. Tær vanligu, sum eru grønar og so hvítar línur. Línurnar vóru heilt eins, bert liturin var øðrvísi.

Mynd 1 – 4 vísa hvussu gørnini í royndartrossanum vórðu sett saman.




Flotlína: Tjúkd 16 mm, flotevni 115 g/m, longd 30,50 m.
Søkklína: Tjúkd 14 mm, søkkievni 250 g/m, longd 30,50 m.
Net: Monofilament, trátjukd 0,70 mm.

*Mynd 1: Tekning av einum garni*




*Mynd 2: Royndartrossin í 2007.*




*Mynd 3: Royndartrossin í 2008.*




*Mynd 4: Royndartrossin í 2009.*

**Úrslit:**

***Ymiskir litir á línunum:***

Tveir ymiskir litir á línunum vórðu royndir. Hvítar línur og grønar línur, sum er tann vanligi liturin, ið bátar nýta. Talva 1 vísir munin á veiðuni millum hesar báðar litirnar. Tað vísti seg, at í miðal fiskaðu hvítar línur betur. Mynd 5 vísir tal av havtaskum í gørnunum pr. draging.

| | Íalt | Miðal pr. draging |
|---|---|---|
| Hvítar línur | 416 | 21,9 |
| Grønar línur | 324 | 13,1 |

*Talva 1: veiða við ymiskum litum á línunum*




*Mynd 5: Tal av havtaskum í gørnunum pr draging.*

***Merki við ymiskum litum hangandi á gørnunum:***

"Merki" við ymiskum litum vórðu fest á gørnini. Hesar royndir vórðu gjørdar í 2007, 2008 og 2009. Talva 2 vísir veiðuna, tal av havtaskum, við ymiskum litum á merkjunum. Mynd 6 - 8 vísir tal av havtaskum í gørnunum pr draging.

| | 2007 íalt | 2007 miðal | 2008 íalt | 2008 miðal | 2009 íalt | 2009 miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eingi merki | 324 | 17,1 | 301 | 19,1 | 244 | 24,4 |
| Reyð merki | 361 | 19,0 | 387 | 25,0 | | |
| Grá merki | 389 | 20,5 | | | | |
| Gul merki | 389 | 20,5 | 413 | 28,4 | 230 | 20,9 |
| Refleks | *217** | *18** | | | | |
| Svart | | | 350 | 23,0 | | |
| Reytt M | | | 343 | 24 | | |
| Reytt silki | | | | | 268 | 24,4 |

*Talva 2: Samlað tal av havtaskum við ymiskum litum og miðaltal av havtaskum fyri hvørja draging.*




*Mynd 6: Tal av havtaskum í gørnunum hvørja draging í 2007.*




*Mynd 7: Tal av havtaskum í gørnunum hvørja draging í 2008.*




*Mynd 8: Tal av havtaskum í gørnunum hvørja draging í 2009.*

***Royndir við ymiskum meskastøddum.***

Tríggjar ymiskar meskastøddir vóru royndar í 2009. Meskastøddirnar vóru 360mm, 330mm og 300 mm, sum er tað, ið báturin vanliga nýtir. Talva 3 vísir veiðuna við teim ymisku meskastøddunum. Umframt er miðallongd og samlað vekt í talvuni soleiðis, at samlaða veiðan við ymiskum meskastøddum kann síggjast. Mynd 9 vísir tal av havtaskum í gørnunum hvørja draging.

| | Tal | Miðallongd | Samlað vekt |
|---|---|---|---|
| 300 mm | 244 | 80,39 | 1413 |
| 330 mm | 209 | 81,62 | 1290 |
| 360 mm | 134 | 84,85 | 899 |

*Talva 3: Tal av havtaskum, miðallongd og samlað veiða við meskastøddunum 300mm, 330mm og 360 mm.*




*Mynd 9: Tal av havtaskum hvørja draging við ymiskum meskastøddum.*

**Niðurstøða:**

***Litur á línum***

Tað vísir seg, at liturin á línunum kann hava nakað at siga fyri fiskiskapin. Gørnini við teim hvítu línunum fiskaðu íalt 416 havtaskur, meðan gørnini við teim vanligu grønu línunum fiskaðu íalt 324 havtaskur. Um man kannar hettar nærri, vísir tað seg, at tað serliga eru tríggjar setur, sum gera munin, men um man sær burtur frá teimum, vísir tað seg tó, at gørn við hvítum línum fiska eitt sindur betur.

***Merki við ymiskum litum á gørnunum***

Í 2007 og 2008 vísti tað seg, at við gulum merkjum hangandi á gørnunum royndist fiskiskapurin munandi betur, enn um ongi merki vóru á teimum. Í 2007 og 2008 vóru tað eisini gørnini við ongum merkjum, sum fiskaðu ringast. Í 2009 var tað øðrvísi, tá fiskaðu gørnini við gulum merkjum ringast, meðan tey við ongum merkjum og reyðum silkimerkjum fiskaðu betur. Hvat hetta kemst av, er ringt at siga. Ein møguleiki er, at atburðurin hjá havtaskuni er øðrvísi, tá lítið er til av havtasku. Fiskiskapurin í 2009 var verri enn hini árini . Hin møgulleikin er at tað ikki er nakar munur á fiskiskapinum, um nakað hongur á gørnunum ella ikki.

***Ymiskar meskastøddir***

Í 2009 vórðu tríggjar ymiskar meskastøddir royndar, 300 mm, 330 mm og 360 mm. Tað vísti seg, at 300 mm meskar fiskaðu best, bæði í tali og nøgd. Tó var munurin ímillum 330 mm og 300 mm ikki so stórur, umleið 6 %. Tað vísti seg at gørnini við 360 mm meskum fiskaðu munandi minni enn hinar meskastøddirnar, bæði í tali og nøgd. Hetta úrslitið er munandi øðrvísi enn í 2003, tá líknandi royndir vórðu gjørdar. Í teimum royndunum vórðu meskastøddirnar 280 mm, 300 mm 380 mm og

400 mm royndar. Úrslitið frá teimum royndunum vístu at 380 mm fiskaðu mest í vekt. Orðsøkin til hetta kann vera, at havtaskan er smærri nú enn í 2003.













HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo